# Seta skjøtil á umvælingar fyri 350 milliónir



*Hans Pauli Strøm ætlar sær nú at seta skjøtil á eitt grundleggjandi arbeiði at umvæla og nútímansgerða gomlu bygningarnir á Landssjúkrahúsinum*

**Nú verður fyrsta stigið tikið til eitt sera dýrt og umfatandi umvælingararbeiði á Landssjúkrahúsinum**

LANDSJÚKRAHÚSIÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal skjøtil setast á eitt sera umfatandi og dýrt umvælingararbeiði og nútímansgerð á Landssjúkrahúsinum.

Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í heilsumálum, hevur nú biðið tingið játtað pening til eina høvuðsumvæling av landssjúkrahúsinum.

Í fyrstu syftu er ætlanin at umvæla og nútímansgera landssjúkrahúsið fyri 105 milliónir hesi næstu trý árini frá 2006-2008.

Men tilsamans fevnir ætlanin um at eitt 10 ára skeið, har Landssjúkrahúsið skal umvælast og nútímansgerast fyri fyri heilar 350 milliónir. Sostatt er neyðugt at játta 35 milliónir um árið tey næstu 10 árini.

Í summum førum er standurin so ringur, at tað loysir seg betri at ríva niður og byggja av nýggjum í nøkrum førum, heldur enn at umvæla, men annars skulu umfatandi umvælingar gerast bæði innan og uttan.

Hans Pauli Strøm leggur dent á, at tað, sum nú skal gerast hesi næstu trý árini, er bara tað fyrsta stigið og at tað umráðandi, at ætlanim verður sæð sum ein heild.

Tað fyrsta stigið kann ikki standa einsamalt og tí er neyðugt at halda á fram eftir hetta fyrsta stigið, so rokkið verður á mál.

Tí ætlar hann sær longu næsta ár, ella í seinasta lagi í 2008 at leggja fram uppskot um næsta stig í hesi heildarætlan um at høvuðsmvæla og nútíðargera Landssjúkrahúsið.

Alt hetta arbeiði hevur sín uppruna í eini størri ætlan frá 1991, men hon steðgaði í kreppuni í nítiárunum. Men í 1998 var arbeiðið at útbyggja Landssjúkrahúsið tikið upp aftur og síðani hevur verið arbeitt framhaldandi við verkætlanini, sum er komin so langt ávegis, at flutt var inn í nýggja bygningin hjá Landssjúkrahúsinum á heysti í 2004.

Frá 1999 til 2004 fór næstan øll orka til nýggja bygningin og tað hevði við sær, at ráðini vóru ikki til eina grundleggjandi høvuðsumvæling og nútíðargerð av gomlu bygningunum.

Tí er tað arbeiðið eftir at gera og bygningarnir eru í slíkum standi, at ein høvuðsumvæling er meira átrokandi enn nakrantíð.

Tó er ein høvuðsumvæling av íbúðabygningunum ikki tikin við í ætlanina, tí arbeitt verður við at selja nakrar av teimum.

Annars sigur Hans Pauli Strøm, at talan er um eitt sera umfatandi arbeiði, sum er bæði kompliserað, og í hátøkniligum umhvørvi. Eisini er talan um at arbeiða á øki, har sjúkrahúsvirksemið skal kunna fara fram, meðan umvælingar verða framdar.

---

# Bíligari bil til húski við nógvum børnum

**Húski við nógvum børnum skulu fáa avsláttur, tá ið tey keypa bil, heldur miðflokkurin**

FAMILJUPOLITIKKUR

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Húski við í minsta lagi fýra børnum undir 18 ár, eiga at fáa avsláttur, tá ið tey keypa bil

Tað heldur miðflokkurin.

Flokkurin hevur lagt uppskot fyri løgtingið um at húski við nógvum børnum, skulu fáa avsláttur, at keypa ein stórfamiljubil.

Flokkurin sigur, at avsláttururin skal veitast soleiðis, at húski við minst fýra heimabúgvandi børnum skulu hava rætt til ein avsláttur upp á 50.000 krónur í skrásetingargjaldinum, tá ið tey keypa ein stórfamiljubil, sum alt húski rúmast í.

Tá ið flokkurin tosar um stórfamiljubil, verður hugsað um persónbil til minst seks fólk, tá ið førarin er taldur við.

Og tá ið miðflokkurin tosar um húski við nógvum børnum, sum skulu fáa rætt til avsláttur, hugsar hann um húski, sum hava minst fýra børn undir 18 ár.

Miðflokkurin sigur, at endamálið er at veita barnaríkum húskum ein avgjaldslætta tá til at útvega sær bil til, sum alt húski rúmast í.

Dentur verður lagdur á, at hugsað verður ikki um smábussar við minst 10 setrum, men einans um persónbilar.

Avgjaldið á vanligar persónbilar er 50% av fyrstu 70.000 krónunum í fakturavirði, 75% av upphæddini oman fyri 70.000 og síðani eykaavgjald upp á 25% av áðurnevndu avgjøldum.

Flokkurin vísir á, at tað er dýrt at hava eitt stórt húski.

– Við støðugum príshækkingum á neyðsynjarvørum, serliga olju, er tað alsamt vorðið fíggjarliga tyngri hjá størri húskjum, sigur flokkurin.

– Tí eru tað bara tey, sum eru heilt væl fyri, sum hava umstøður at útvega sær persónbil til minst seks fólk, tá ið førarin er taldur við. Hesir bilar kosta í miðal ímillum 10.000 og 50.000 krónur meiri enn vanligir persónbilar.

Tí heldur miðflokkurin, at tað er rætt at veita hesum húskjum stuðul, so tey hava sama møguleika sum húski við minni enn fýra børnum at útvega sær persónbil eftir tørvi.

Flokkurin leggur serligan dent á trygdina.

– Løggávan eigur at vera soleiðis skipað, at spurningurin um kostnað ikki skal ganga út yvir trygdina. Familjan við minst fýra børnum eigur ikki at setast aftur at útvega sær ein størri persónbil, tí hesin kostar meiri enn ein vanligur persónbilur, sigur miðflokkurin.

Miðflokkurin sigur, at søkja 400 húski um avsláttur, fer tað at kosta landskassanum 20 milliónir í mistum skrásetingargjaldi.

– Hinvegin fær landskassin framvegis stórt avgjald av teimum bilum, sum verða seldir undir hesi skipan. Og fyri hvørja ferð lógin er beinleiðis orsøkin til, at ein bilur verður keyptur, fær landskassin avgjøld, sum hann annars ikki hevði fingið.



*Tey, sum eiga minst fýra børn, skulu fáa avsláttur, tá ið tey keypa bil, sum alt húskið rúmast í, heldur miðflokkurin*